# Kjak



Dávid Isfeld
*Hósvík*

## Skal Havnin vera ein kommunu-almannastova?

**Dupultmoralur og sjálvsøkn**

Nú búgvi eg ikki í Havn, men eg kann ikki lata vera við at spyrja: Hvar kemur hesin tokkin hjá bygdafólkum til Havnina frá? Bygdafólk hava alla mína tíð grenja um Havnina og havt lítlan tokka og virðing fyri fólkið, sum býr í Havn. Nú vilja ymsar smáar bygdakommunur upp í Tórshavnar kommunu. Eg havi einki ímóti hesum bygdafólki ella kommunusamanlegging, men tá tað bert tykist at vera ynski um pengar úr Tórshavnar kommunu, sum stendur aftan fyri hetta ynski um kommunusamanlegging, so tykist tað bæði dupultmoralskt og sjálvsøkt.

Lítil ivi er í, hvør fær mest burturúr hesi samanlegging. Tað fer óivað fleirfalda so nógvir pengar úr Havnini til hesi smápláss, enn tað koma frá teimum til kommunukassan í Havn.

**Sunda kommuna**

Sunda kommuna er eitt gott dømi um kommunusamanlegging, ið gevur meining. Her eru fleiri lítlar grannabygdir, ið hava sæð, hvat tær kunnu geva hvørjum øðrum, og hvat tær kunnu fremja í felag. Her er talan um eina samanlegging, ið er samhaldsføst og skilagóð.

**Blokkstuðulsmentalitetur**

Hetta her við at ynskja og biða um pengar úr einum pengakassa, ein einki beinleiðis samband ella rætt hevur til, minnir um ynski føroyinga til blokkstuðul – sum um hetta er ein íborin rættur. Mær tykist, at blokkstuðuls-mentaliteturin hevur órógva fatanina av tilverugrundarlag og ábyrgd hjá nógvum føroyingum. Vit mugu eisini duga at síggja, hvat ein kann loyva sær at biða um. Míni børn sýna meira høgv, tá ið tey biða um okkurt, enn nógv vaksin í Føroyum. Vanahugsanin um rætt til pengar, ein ikki sjálvur hevur arbeitt fyri, er sera avskeplandi og skaðilig. Satt at siga dugi eg ikki at síggja, hví lítlu kommunurnar ikki kunnu tosa við sínar grannakommunur og finna eina góða loysn viðvíkjandi kommunusamanlegging. Tað átti at verið tað mest logiska og skilabesta at gera.

Eingin kommuna eigur at virka sum ein almannastova fyri aðra kommunu. Tað vil bert fungera sum ein respirator og fremja líkasælu, framtaks- og visjónsloysi í minnu kommununi. Um tú ikki megnar at lívbjarga tær sjálvum, har tú ert, mást tú taka fylgjurnar av hesum.



Helgi Abrahamsen
*Strendur*

## Svar til ein troyttan lesara

Majbritt Pauladóttir skrivar í eini blaðgrein, at hon er farin at troyttast av míni blaðskriving. Tað skilji eg væl, tí eg skrivi nokkso nógv, og sum eg skilji á lagnum, so hevur hon lisið alt tað, sum eg havi latið úr hondum hetta seinasta árið. Hon sigur seg vera ósamda við mínum sjónarmiðum, og tí vil hon hava meg at leggja pennin frá mær í stundini.

Tað er eitt løgið krav at seta, tí um hon er troytt av mínum greinum, so kann hon bara lata vera við at lesa tær. Tað er eingin náttúrulóg sum sigur, at øll skulu lesa alt sum stendur í bløðunum.

**Munurin ímillum rætt og skeivt**

Pauladóttir skrivar, at eg vísi ov ofta á, hvat onnur gera skeivt, heldur enn at vísa á, hvat mín egni flokkur ger rætt. Tað er tíverri ein fella, sum vit øll detta í av og á. Men tá tað er sagt, so er tað soleiðis í politikki, at eitt sjónarmið stendur altíð ímóti einum øðrum. Tí ber illa til at siga, hvat er rætt, uttan eisini at siga í mun til hvat (altso hvat er skeivt).

**ABC hevur raðfest tey bleytu virðini**

Greinin sum fekk bikarið hjá Majbritt Pauladóttir at flóta yvir, var ein sum kallaðist "So einfaldur er veruleikin ikki". Tann greinin var skrivað sum eitt aftursvar til Bergtóru Høgnadóttir Joensen, ið vildi vera við, at tey bleytu virðini høvdu onga raðfesting fingið frá sitandi samgongu. (Ella fyri at brúka eina av ábreiðslunum hjá Majbritt Pauladóttir, so vísti Bergtóra á, hvat samgongan gjørdi skeivt, heldur enn at vísa á, hvat hennara egni flokkur gjørdi rætt).

Eg vísti á, at játtanin til almanna- og heilsumál er størri partur av fíggjarlógini nú, enn hon var tá CHE-samgongan ráddi fyri borgum. (Vísti á, hvat vit høvdu roynt at gjørt rætt). Í krónum er talan um eina øking í játtanini, sum er omanfyri 300 mió. krónur. Um Majbritt Pauladóttir kann prógva, at hesi tølini ikki passa, so skal hon vera meira enn vælkomin at rætta meg, men eg rokni við at tað verður trupult, tí tølini eru almenn.

**Bleyt virði ella fullveldi**

Eg vísti eisini á, at CHE-samgongan arbeiddi við at skerja 117 mió. krónur afturat av inntøkusíðuni hjá landskassanum á hvørjum ári, frá 2009 at rokna. Um tann ætlanin ikki varð steðgað, høvdu tey bleytu virðini verið sera hært rakt, men tíbetur fingu vit eina aðra samgongu, áðrenn tann ætlanin varð sett í verk. Men Majbritt Pauladóttir skal vera vælkomin at mótprógva henda pástand, um hon heldur seg kunna tað.

Og so vísti eg eisini á, at tað ber ikki til at raðfesta pengar, sum ikki eru til. Eisini tað skal Majbritt Pauladóttir vera vælkomin at mótprógva, um hon vil.

**Keðiligt**

Men fram um alt, so skal hon vera vælkomin at lata vera við at lesa mínar greinar, um hon heldur, at innihaldið gongur hennara meiningum ov nær. Tað er nevniliga øðiliga keðiligt at skula viðganga, at vit ikki hava ráð til alt, og at jú meira vit taka burturav á inntøkusíðuni, minni hava vit at eftir at gera gott við á útreiðslusíðuni.

**Vælferð heldur enn fullveldi**

Viðvíkjandi spurningi hennara um, hvat eg vil í politikki, so vil eg virka fyri einum vælferðarsamfelagi, har føroyingar kunnu liva væl og trívast. Tað hevur, eftir mínum tykki, nógv størri týdning, enn tað at kunna kalla Føroyar ein fullveldisstat við ongum innihaldi.

## At sigla er neyðugt!

*Vit góðtaka treytaleyst rættin hjá fakfeløgunum at samráðast, og at taka avleiðingarnar av tí, um semja ikki finst við arbeiðsgevararnar. Soleiðis er frælsi arbeiðsmarknaður okkara laðaður, og vit virða skipanina*

Hinvegin kunnu vit ikki góðtaka at vera verri sett enn onnur, sum ósjálvboðin gerast partur av einum verkfalli. Soleiðis hevur støðan verið í mong ár hjá okkum føroyingum, sum ikki hava fast samband við meginøkið. Tað kemur tí ikki óvart á nakran, at støðan ikki longur verður góðtikin. Samanborið við umstøðurnar har vegasamband er, er dagliga frælsi okkara at flyta seg avmarkað. Tá verkfall er, gerst støðan snøgt sagt ótolandi.

Vit heita tí inniliga á feløgini á almenna arbeiðsmarknaðinum, um at hava somu virðing fyri samferðslurættindum okkara, sum vit hava fyri rættindum tykkara á frælsa arbeiðsmarknaðinum. Vit eru bert eini 15 % av borgarunum í landinum, og niðurløgd samferðsla, er sum steinur omaná byrðu. Nógmikið er sum gongur ímóti sum er.

Latið tyrlurnar og skipini hjá Strandfaraskipum Landsins sigla, hóast tit velja at leggja arbeiðið niður eina tíð.

*Virðingamest*
**Sandoyar Tjóðveldisfelag**
Kristian Oskar Henriksen, formaður
Elisabeth Myllhamar
Maiken Krabenhøft
Eli Hansen
Páll á Reynatúgvu